# Bilar

Nr. 211 • hósdagur • 4. november 2004 • 78. árg.



*Í kabinuni er eisini nógv nýtt við t.d. nýggjum instrumentum, mittarkonsoll og inntrekki. Bilurin hevur 6 trins girkassa*

Citroën C5 2,0 HDi Elegance:

## Komfortur sum í størri og dýrari bilum

**Citroën C5 hevur fingið eina so víðfevnda facelift, at hann sær út sum ein heilt nýggjur bilur. Svarið hjá Citroën til hørðu kappingina um kundarnar er ein kombinatión av nýggjum designi, framkomnari teknologi og komforti**




*Citroën C5 2,0 HDi er nýggjur bæði framman, aftan og innan. Koyriljósini kunnu tendrast og sløkkjast við fjarstýringini í startlyklinum*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Stóru Citroën bilarnir við hydrauliskari fjaðraskipan hava altíð verið nakað heilt serligt. Talan er um komfort á høgum støði, ið annars bert fæst í størri og nógv dýrari bilum.

At koyra nýggja C5 2,0 HDI við common-rail dieselmotori við 138 hk og momenti upp á 320 Nm má upplivast. Tað er lítið sum bendir á, at bilurin er diesel. Motorurin hoyrist næstan ikki inn í bilin, og hann er so kvikur sum ein sprintari.

Hóast karossaríið er tað sama, er nýggi C5-arin 12 cm longri enn forgangarin. Bæði forlyktirnar og boomeranglíknandi baklyktirnar eru nýggjar. C5 hevur nýggja kølaragittari við stórum Citroën logo, sum kemur at eyðkenna fleiri av nýggju Citroën bilunum.

### Prestige, Elegance og Exclusive

Í kabinuni er eisini nógv nýtt við t.d. nýggjum instrumentum, mittarkonsoll og inntrekki. Bilurin fæst í útgávunum Prestige, Elegance og Exclusive.

C5 fæst við trimum ymiskum bensinmotorum og trimum HDi dieselmotorum við common rail innspræning. Bensinmotorar'nir eru hesir: 1,8i við 117 hk, 2,0i við 143 hk, 3,0i V6 við 210 hk,og dieselmotorarnir eru hesir: 1,6 HDi við 110 hk, 2,0 HDi við 138 hk, og 2,2 HDi 136 hk við automatiskum girum.

C5 fæst við nógvari nýggjari og spennandi eykaútgerð, sum t.d. Xenon-lyktum sum snara við tá bilførarin snarar rattinum. Sum nakað heilt nýtt fæst C5 eisini við vegstrípu-alarmi, sum ger at um bilurin koyrir um eina vegstrípu uttan at vísa av, fer førarasetrið at vibrera soleiðis, at bilførarin vaknar.

Bíligasti Citroën C5 (1,8i Prestige) kostar 240.000 krónur og bíligasti diesel (1,6 HDi) kostar 259.000 krónur.



*Citroën C5 er ein stórur og elegantur bilur við 5 hurðum og stórari baklúku*




*Boomeranglíknandi baklyktirnar eru í nýggjasta móta og smartar*

### Citroën C5 2,0 HDi Elegance

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur HDI diesel 138 hk |
| 0-100 km/t | 9,8 sek |
| Snúningsmoment | 320 Nm við 2.000 snún./min. |
| Oljunýtsla | 16,7 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 215/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 474,5 cm |
| Breidd | 178,0 cm |
| Hædd | 140,3 cm |
| Eginvekt | 1.475 kg |
| Viðførisrúm | 471 litrar |
| Prísur | kr. 298.000,- + (kr. 3.500 fyri metallak) |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |






*MC-Sølan á Norðasta Horni selur bæði skutarar, motorsúkklur og hópin av MC-útgerð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

MC-Sølan, Tórshavn:

## Dreymasúkklur á Norðasta Horni

**Sølan av motorsúkklum í Føroyum hevur verið í støðugum vøkstri seinastu árini. Ein serhandil, MC-sølan, v. Anders Berg á Norðasta Horni, selur bæði skutarar, motorsúkklur og hópin av MC-útgerð**

MC-HANDIL
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

MC-Sølan v.Anders Berg í Skemmingsgøtu 23 í Havn er ein fyritøka sum umframt at selja nýggjar skutarar, motorsúkklur og o.l. eisini hevur spesialiserað seg í at skaffa góðar brúktar motorsúkklur úr Týsklandi.

Anders Berg sigur, at nógv av teimum sum keypa brúktar motorsúkklur, eru fólk sum t.d. hava eitt ynski um eina ávísa motorsúkklu, sum tey í longri tíð hava droymt um at ogna sær.

MC-Sølan hevur góðar kontaktir í Týsklandi, og súkklurnar teir taka heim, eru við garanti í besta standi, sigur Anders.

Fyritøkan umboðar eisini sponsku Derbi, taiwansku PGO, og italsku Piaggio og Gilera skutararnar og italsku Ducati og japansku Kawasaki motorsúkklurnar.

Eisini fáast t.d. hjálmar, stivlar, handskar, jakkar, draktir og blusur. Klæðini eru t.d. av finsku merkjunum "Rukka" og "MP-ASU". Anders sigur, at alt sum tey selja eru merkivørur í besta kvaliteti og fáast í nógvum ymiskum kendum merkjum.

Allir vanligir eykalutir til skutarar og motorsúkklur eru á goymslu og stórt úrval av Michelin og Pirelli dekkum.

### Vitjan í komandi viku

Í komandi viku kemur danin Gunnar Grønbæk, frá fyritøkuni Skjern Motorsykler, til Føroya at hjálpa til við at gera eftirlit av motorsúkklum fyri MC-Søluna. Hann hevur arbeitt við motorsúkklum í meira enn 30 ár, og øll eru vælkomin út í Skemmingsgøta at fáa eitt prát við Gunnar og at seta honum spurningar ella at fáa góð ráð, sigur Anders.

Í vikuni komu tvær súkklur av nýggjastu modellunum hjá Derbi og PGO til landið.

Onnur ein Derbi GPR50 er eitt flott "sportsprutl", ið sær út sum ein verulig motorsúkkla. Motorurin er 50 cc við 6-girum. Koyri-eginleikarnir eru sum á eini kappkoyringarsúkklu.

Hin er ein PGO G-Max, ið er ein nýmótans sportsligur skutari við t.d. fjarstýring til at lata bensindekslið upp og til at loysa setrið fyri at sleppa í viðførisrúmið.

Súkklurnar kunnu síggjast hjá MC-Søluni, tel. 311101 / 216300. Vanliga er opið gerandisdagar frá 16-20, og leygardag frá 11-15.

Í komandi viku, viku 46, frá 8.-13. november, verður opið allar dagar frá 10-18, eisini leygardagin.

### Lada Kalina



Farmleiðslan av nýggja Lada Kalina byrjar 18. november 2004, og fyrstu bilarnir koma til Danmarkar síðst í 2005. Eftir ætlan skulu framleiðast 1. millión lada Kalina um árið

*Kelda: Motor Magasinet*

### Nissan framgongd



Nissan hava selt 2,8 prosent meira bilar í Evropa í ár í mun til í fjør. Størsti vøksturin var í Fraklandi, har sølan vaks við 15,6 prosentum

*Kelda: Motor Magasinet*

### Alfa og Lancia



Fiat-leiðslan hevur avgjørt at flaggskipini hjá Alfa Romeo og Lancia, ávikavist 166 og Thesis, ganga út í 2007, tá teir annars skuldu fingið ein avloysara.

*Kelda: Motor Magasinet*